# Lama Sea í hopla



*Mynd: Ólavur Frederiksen*

**Lama Sea spældi eina feita konsert á Gøtusandi leygardagin. Ikki vóru tey so mong, sum høvdu leitað sær oman á sandin, men tey sum vóru til staðar hoyrdu ein sannførandi bólk framføra veitslukendan popp/rokk tónleik.**

G! FESTIVAL
Rókur Jákupsson Jakobsen
rokur@sosialurin.fo

Lama Sea hevur í langa tíð verið mettur sum ein spennandi og evnaríkur bólkur við eini bjartari framtíð. Men nú tykist sum um bólkurin ikki longur er lovandi – hann er dugnaligur og etableraður á tí føroyska tónleikapallinum, og konsertin á G! var júst ein staðfesting av hesum.

Bólkurin spælir betur og betur, og teir skriva eisini betur og betur tónleik. Fleiri av løgunum sita ordiliga væl, og tað er eyðsæð at ungir føroyingar taka tey til sín. Áhoyrarar sleppa at hoppa og dansa saman við Lama Sea, og tá ið tónleikurin svingar allarmest, kanst tú bara nikka váttandi og geyla "Yeah"!

Hóast tað ikki vóru serliga nógv fólk til staðar, so er tað eyðsæð at bólkurin hevur fjepparar, sum kenna løgini hjá bólkinum.

Serliga er tað sangarin, Janus Rasmussen, sum dugur væl at føra seg fram sum oddamaður. Hóast Janus far harða kapping frá bassleikarinum, so er tað Janus, sum er veruligi oddamaðurin í bólkinum. Hetta er eitt gott tekin, tí at hetta, at fleiri í bólkinum halda seg framat á pallinum, er ein mangulvøra hjá føroyskum tónleikabólkum.

Janus hevur eisini ein rættiliga egnan sangstíl, og tað ger bara tónleikin enn meiri spennandi. Bólkurin spælir eitt slag av nútímans rokk/popp tónleiki, og teir hava helst funnið íblástur frá fleiri av teimum bólkum, sum eru frammi í dag.

**Spruttandi tónlistarlig uppliving**

Lama Sea eru eisini stuttligir at hyggja eftir. Teir liva og dansa við tónleikinum, og tú verður sum áhoyrari mintur á, at tónleikurin er ein stór veitsla. Teir síggja eisini gott út á pallinum. Tá ið teir eru á palli leggur tú beinanvegin merki til eina spruttandi tónlistarliga orku. Teir drøna avstað, og áhoyrarin sleppur at liva við framførsluni, tí at limirnir eru so lívligir, at tað verður endurspeglað í okkum sum lýða á.

Í einum lagið spældi Tróndur uppá eitt ljómborð sum gjørdi, at hann ljóðaði sum ein robottur. Hetta riggaði heilt væl, og minnir okkum enn einaferð á, at Lama Sea er ein bólkur sum er á tremur við góðum hugskotum. Og hetta er eisini við til, at gera bólkin til ein hin mest spennandi í landinum. Bólkurin er at meta sum eitt frískt lot í einum tónlistarligum landslagið, sum í langa tíð hevur verið merkt av myrkari tónleiki. Meiri veitslu rokk/popp til fólkið!

Samanumtikið var tað ein feit konsert við Lama Sea.

# Gomlu gubbarnir groovaðu, guitarin græt – Gøta gleddist!

*Mynd: Ólavur Frederiksen*



**The Holmes Brothers spældu eina framúrskarandi konsert á spæliplássinum í Syðrugøtu**

G! FESTIVAL
Theodor E. D. Olsen
theodor@sosialurin.fo

Amazing Grace! So greitt kann tað sigast um framførsluna hjá The Holmes Brothers á G!. Bólkurin, sum hevur framført fyri forsetum og øðrum góðum fólki, vísti, at hann er ein av heimsins bestu blues- og gospelbólkum, og enn einaferð varð tað staðfest, at tað at spæla á spæliplássinum á G! als ikki er nøkur degradering, men eitt val, hvar tónleikurin riggar best. Spæliplássið var eitt fantastiskt stað at vera á, ta løtuna Holmesbrøðurnir spældu.

Løtan var intim, og kortini rokkut. Vøkur, men kortini festlig. Røturnar aftur til Robert Johnson og aðrar blues-undangongumenn hómaðust, men spæligleðin var egin, og hon ávirkaði áhoyrarnar á tí stúgvandi fulla spæliplássinum, sum dansaðu framman fyri pallin.

Umframt at spæla væl á ljóðførini, so var tað eisini ein fragd fyri oyra at hoyra tann tríraddaða sangin. Røddin hjá trummuspælararanum, Popsy Dixon, er verd at taka fram, men bluesrøddin og bassrøddin hjá ávikavist Wendell og Sherman Holmes fóru beint inn í hjørtuni.

Holmes Brothers góvu okkum ta ektaðu vøruna, og bæði feeling og spæl gingu upp í eina hægri eind.

The Holmes Brothers spældu annars í Føroyum í 1991, tá Jazz-, fólka- og bluesfestivalurin bjóðaði føroyingum góðan tónleik í Norðurlandahúsinum. Vónandi ganga ikki aftur hesaferð 15 ár, til vit hoyra teir í Føroyum, tí konsertin á spæliplássinum við The Holmes Brothers var uttan iva ein av teimum bestu á G! í ár.

Well, kanska hendan umrøðan er ein lovprísan frá einum gomlum blueselskara. Men sum teir sjálvir sungu, so er náðin stór. Amazing Grace! Feitt!

## Døkkur seinnapartur á Spæliplássinum

**Seinkaðir 15 min. og við eini heldur stirvnari byrjan, fekk Pólson tó borið sítt tónlistarliga úttryk væl fram. Konsertin var fríggjadag, men sum ein lurtaði fekk ein eina kenslu av tað aftnaði. Huglagið á framførda tilfarinum var nevnliga rættiliga myrkt, men eisini vakurt**

G! FESTIVAL
Johan Jacobsen
Johan@sosialurin.fo

Tilfarið, sum Pólson hevur at arbeiða við er gott og hevur eina sterka kenslu í sær. Hetta tilfar er annars upplagt sum ljóðspor á einum filmi, ið snýr seg um eitthvørt dramatiskt, melankolskt og, ikki at gloyma, um vakurleika.

Tilfarið, sum Pólson leveraði, var av útgávuni Koma. Ein kensla av melankoli er í hesi útgávuni, og hendan kenslan var eisini listarliga væl framborin, hetta hóast tað var á alljósum fríggjadegi. Tó ikki so dapur, at Pólson ikki hevði yvirskot til at skemta eitt sindur undir hesum ofta so tungu og álvarasomu sangunum.

Vøllurin við spæliplássið var langt frá fyltur av fólki hesa løtuna, men ein varð avgjørt hugtikin av framførsluni. At hoyra hesar frálíku sangir framførdar av bólkinum sjálvum var gevandi.

Konsertin var seinkað 15 minuttir, sum er rættiliga nógv, tá ið ein hugsar um strømmu festival-skránna. Seinkingin gjørdi tað, at tá ið Petur Pólson vóru komnir í helvt, byrjaðu Makrel niðri á sandinum. Hetta fekk nøkur at fara oman á sandin at lurta eftir Makrel og kanska onnur at standa í iva. Men framførslan varð sannførandi.

Byrjað var við einum lagið við triphop-íblástri og Kára Sverrisyni á eitt bulgarskt fiól-ljóðføri. Serliga væl framborin varð lagið Einsemi, sum hevði eina ráða og tunga útseting. Síðsti sangurin á fløguútgávuni, Koma, við sama navni, rundaði framførsluna av. Hetta er eitt stórsligið lag - ein vøkur symfoni við strúkarum, sum er sjálvsama væl eydna. Bogi á Lakjuni, sum spældi gittar á konsertini, var prodúsari á Koma. Hann hevur helst havt ein leiklut í útsetingini av hesum lagi. Eyðkenda gittarljóðið hjá honum er ofta at hóma í ljóðmyndini á Koma og eisini á hesi konsertini.



*Petur Pólson hevur eitt framúr gott sangtilfar at arbeiða við. Huglagið konsertini var rættiliga myrkt. Men serliga endin var stórsligin og vakur við lagnum, rock-symfoniini, Koma*

*Mynd: JJ*